## VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið mikudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi, seinnapartin minni vindur av vestri. Sólglottar, men eisini ælingur, um kvøldið partvis vátakavi. Hitin millum 6 og 9 stig ~um kvøldið niður í 4 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av vestri og útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 3 og 6 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Fríggjadagin lot til andøvsgul av útnyrðingi og vestri og yvirhøvur turt og sólglottar, men leygardagin lækkar hann niður í útsynning og ælingur. Hitin millum 6 og 10 stig.

## DAGSINS FØROYINGUR

# Hárskeri í Vágsbotni

**Klipp, klipp, klipp. 38 ára gamla Elsa Falkenberg starvast sum hárfríðkanarkvinna í Harra Klipping í Vágsbotni. Vit hittu Elsu meðan hon fríðkaði um ein stamkunda**

*Rókur Jákupsson Jakobsen*
*rokur@sosialurin.fo*

*Elsa tekur sær væl av sínum kundum*

**■ Hvussu leingi hevur tú vilja verið hárfríðkanarkvinna?**

– Eg havi altíð havt ætlanir um at gerast hárfríðkanarkvinna. Mamma sigur at longu tá eg var seks ár prátaði eg um tað. So hetta er ikki av tilvild. "Eg var útlærd í 1991, so eg eri ein gomul rotta í fakinum", sigur Elsa Falkenberg

**■ Hvør er munurin á at klippa mannfólki og konufólki?**

– Munurin er stórur. Eg vil ikki fara illa við mannfólki, tí at eg havi so nógvar fittar kundar. Men at klippa konufólk er altso meiri avbjóðandi. Tað er avbjóðandi at lita hár, og tílíkt sleppi eg ikki at gera nógv av her".

"Mannfólk eru eisini nokkso afturhaldin. Tað er ikki ofta at teir skifta hársniði, tí tað er best at halda seg til tað trygga", sigur Elsa Falkenberg.

Elsa greiður frá, at tey í Harra Klipping hava nógvar stamkundar. "Tað sær út til at teir trívast væl her, og teir eru væl nøgdir við úrslitið".

**■ Er tað so neyðugt hjá tær at fylgja við í hármótanum?**

– Ja, tað er sera týdningarmikið fyri meg sjálva. Eg vil gjarna halda tað fakliga við líka, og tí fylgi eg so væl við sum gjørligt. Eg luttaki á nógvum ymiskum skeiðum, so har verið eg fóðra við tí nýggjasta nýggja. Men tó skal sigast, at tey flestu skeiðini snúgva seg um konufólkamótan, og tað er ein trupulleiki, sigur Elsa.

**■ Hvørjum vilt tú heilsa?**

– Eg vil gjarna senda eina heilsan til mína familju á Oyrabakka, sigur Elsa Falkenberg at enda.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -- |
| Nuuk | -4 |
| Qaqortoq | -1 |
| Ammassalik | -1 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 4 |
| Seyðisfjørður | 1 |
| Tórshavn | 4 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 8 |
| London | 13 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 4 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 11 |
| Keypmannah. | 9 |
| Helsinki | 4 |
| Moskva | 11 |
| Berlin | 14 |
| Warzawa | 15 |
| Kiev | 19 |
| Bukarest | 13 |
| Paris | 14 |
| Madrid | 19 |
| Róm | 18 |
| Malorca | 18 |
| Athen | 21 |
| Malta | 18 |
| Tunis | 21 |
| Beijing | 18 |
| New Dehli | 31 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | -- |
| Sydney | 27 |
| New York | 20 |
| Miami | 27 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | 25 |
| Panama | -- |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 24 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt djúpt lágtrýst, 966 hPa. vestan fyri Ísland fer spakuliga í landsynning og grynnist. Kuldabrúgvin haðani fer eysturum Føroyar týsnáttina.




**Í dag:**
Lágtrýstið yviri á Suðurlandinum fer í landnyrðing og óstøðug luft rekur av vestri inn yvir Føroyar.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 19/4 kl. $06^{00}$– 20/4. $06^{00}$. Hitin í gjár: 0,6°
Minsti hiti máldur í apríl: -9,9° - Mesti hiti máldur í apríl: 18,3°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,6 mm – mált frá 19/4 kl. $06^{00}$– 20/4 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í apríl: 57,7 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

9. apríl Mánin longst frá jørðini
13. apríl Fullmáni
21. apríl Seinna kvarter
25. apríl Mánin næstur jørðini

Kelda: Almanakkin 2006

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | Suðuroyar-/Vágafirði sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | Hestfirði/Sundalagnum sp. | Vestmannasundi fp. | Vestmannasundi sp. | Mykinesfirði fp. | Mykinesfirði sp. | Nólsoyarfirði fp. | Nólsoyarfirði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp. | Hvannasundi fp. | Hvannasundi sp. | Fugloyarfirði fp. | Fugloyarfirði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 21. apr. | 01.37 | 14.00 | 00.37 | 13.00 | 00.52 | 13.15 | 03.37 | 16.00 | 04.37 | 17.00 | - | 12.15 | 11.15 | - | 01.52 | 14.15 | 02.52 | 15.15 | 01.22 | 13.45 | 02.37 | 15.00 |
| 22. apr. | 02.55 | 15.18 | 01.55 | 14.18 | 02.10 | 14.33 | 04.55 | 17.18 | 05.55 | 18.18 | 01.10 | 13.33 | 00.10 | 12.33 | 03.10 | 15.33 | 04.10 | 16.33 | 02.40 | 15.03 | 03.55 | 16.18 |
| 23. Apríl | 03.42 | 16.06 | 02.42 | 15.06 | 02.57 | 15.21 | 05.42 | 18.06 | 06.42 | 19.06 | 01.57 | 14.21 | 00.57 | 13.21 | 03.57 | 16.21 | 04.57 | 17.21 | 03.27 | 15.51 | 04.42 | 17.06 |
| 24. Apríl | 04.28 | 16.50 | 03.28 | 15.50 | 03.43 | 16.05 | 06.28 | 18.50 | 07.28 | 19.50 | 02.43 | 15.05 | 01.43 | 14.05 | 04.43 | 17.05 | 05.43 | 18.05 | 04.13 | 16.35 | 05.28 | 17.50 |

NÝTT

Fæst við og uttan ABS-bremsum
KAWASAKI DERBY
ØLL MC ÚTGERÐ
MC-SØLAN
Skemmingsgøta 23
Tel. 311 101 & 216 300 - Fax 313 763
www.mc-solan.fo

GEVIÐ BLÓÐ

Veitst tú eina góða?
Ring til Sosialin tlf 341800

5 707265 100029 >